# Jón Rói slapp ikki við

Jón Rói Jacobsen slapp ikki upp í part í fyrsta dystinum hjá AaB í superliguni í ár. AaB spældi á útivølli ímóti OB, og dysturin endaði við javnleiki 1-1. Kanska er vón fyri, at Jón Rói sleppur at spæla næstu ferð. Annar miðverjin, Steve Olfers, gjørdi sjálvmál, og hin miðverjin, Danny Califf, er leiðkannaður til næsta dystin.



# QPR vil hava Figo

Enska blaðið Main On Sunday vil verða við, at Queens Park Rangers í fleiri vikur hevur havt samráðingar við Luis Figo um, at hann skal spæla við felagnum næsta kappingarár. Í løtuni spælir 35 ára gamli Figo við Inter, men sáttmálain gongur út í summar. Sagt verður, at antin fer Figo til USA at spæla ella fer hann enska felagið QPR.



*Kollfirðingar vildu framvegis stríðast, meðan Kyndil longu var farið í summarfrí, tá liðini hittust leygardagin*

*savnsmynd*

Kyndil-KÍF 19-30 (9-13):

# Kyndil fekk bank

**Uttan nakað at spæla fyri megnaði Kyndil ikki at halda dampinum uppi, og so vann KÍF stórt í seinasta dystinum á árinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var eitt nærum sovandi Kyndil-lið, sum kom út á vøllin leygardagin. Øll vón um eitt finalupláss var fokin hjá liðnum, og tí var trupult hjá spælarunum at halda rætta hugburðinum.

Og hóast KÍF eru væl niðastir í landskappingini, so hevur árið víst, at munurin ikki er størri enn so, at við skeiva hugburðinum verður talan heilt víst um tap.

Og kollfirðingarnir vóru eisini til reiðar at lofta møguleikanum at enda árið ordiliga. Teir skaptu skjótt ein mun millum liðini bæði, og tó at Kyndil raknaði nakað við fyri steðgin, so var teimum flestu greitt, at her skuldu gestirnir fara avstað við sínum bert fjórða sigri í ár.

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki hómaðist eisini ein veruligur stórsigur, men heldur ikki hetta fekk Kyndil at raka við, og so líðandi trumlaðu kollfirðingarnir bara víðari.

Á talvuni broytti dysturin tó einki. Kyndil fær bronsumerkini eftir eitt ár, har teir komu ov seint ígongd, og KÍF endar niðast. Eitt vónbrot fyri bæði feløg, sum undan kappingarárinum høvdu avgjørdar ætlanir um at spæla við millum tey bestu.

## FAKTA

**Kyndil-KÍF 19-30(9-13)**
10 min: 4-5
20 min: 7-8
40 min: 12-18
50 min: 16-23
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Finnur Hansson 7, Rani Ellingsgaard 4, Janus Einar Sørensen 3, Ken Zachariassen 2, Hans Áki Dal Christiansen 2, Josef Abrahamsen 1
**KÍF:** Rógvi Weihe 8, Damir Oros 7(3), Teitur Joensen 6, Jóan Pauli Olsen 2, Niklas Reginsson 2, Tony Weihe 2, Jákup Trygvason 2, Regin Petersen 1
**Brotskøst:** Kyndil 1, KÍF 4
**Útvísingar:** Kyndil 2, KÍF 1
**Dómarar:** Eyðun Samuelsn & Andreas F. Hansen

StÍF-Neistin 28-32 (15-18):

# Óvæntað men líkamikið

**Fleiri stuðulsspælarar vóur áskoðarar, tá Neistin vann ein heldur óvæntaðan sigur á StÍF, tá bæði liðini hitaðu upp til finalurnar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á talvuni endaði tað við, at bert eitt stig var á muni millum StÍF og Neistan. Men undan dystinum var longu greitt, at bæði liðini vóru í FM-finaluni, og at StÍF í hesum fær heimavøll í eini møguligari triðju finalu.

Tí var tað so sum so við spenninginum á Skála leygardagin, og tað eyðkendi eisini báðar partar. Teir spælarar, sum høvdu betri av at hvíla seg heldur enn at spæla, fingu eisini loyvi til tess, og hugburðurin hjá hinum spælarunum var ikki av sama slag, sum hann væntandi verður skírisdag, tá fyrsta finalan verður á skránni.

Tað var StÍF, sum byrjaði dystin betur, men spakuliga tók Neistin alt meira yvir. Serliga vóru Dann Thorleifsson og Tróndur Kragesteen væl upplagdir, og tá verjuspælið ikki var tað heilt stóra at reypa av, komu teir fleiri ferðir í heilt góðar skotstøður.

Seinastu minuttirnar undan steðginum dróg Neistin frá, og tann munin høvdu teir hug at økja fyrstu løturnar eftir steðgin.

Heilt leysir sluppu teir ikki, men StÍF megnaði ongan tíð veruliga at koma fyri seg aftur. Stutt fyri leiklok minkaðu teir tó munin niður í eitt mál, men tað takið kostaði nógvar kreftir, og so kundu Neistin og Dann við einum góðum spurti seta punktum fyri dystinum.

Hóast fegnir um sigurin, so var tað ein strika í rokningini hjá Neistanum, at Karl Herup Olsen fekk reytt kort í seinna hálvleiki. Eitt kort, sum ber við sær, at hann ikki verður tøkur til fyrsta finaludystin.



*Intensiteturin var so sum so, tá tey bæði fremstu liðini endaðu endaspælið um vikuskiftið*

*savnsmynd*

## FAKTA

**StÍF-Neistin 28-32 (15-18)**
10 min: 6-6
20 min: 12-12
40 min: 19-23
50 min: 24-27
Málskjúttar
**StÍF:** Danni Syhler 6, David Edvardsen 6(1), Leivur Justinussen 5, Jón Rasmussen 5, Sjúrður Djurhuus 1, Jóannes Prestá 1, Bárður Danielsen 1
**Neistin:** Dann Thorleifsson 10, Tróndur Kragesteen 7(2), Jákup Apol 5, Jugoslav Djumic 4, Blagoje Buha 3, Karl Herup Olsen 3
**Brotskøst:** StÍF 1, Neistin 3
**Útvísingar:** StÍF 2, Neistin 4
**Diskvalifikatión:** Neistni 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Karstin Joensen & Kristian Joensen

VÍF-H71 22-21 (11-12):

# Ov skjótt í summarfrí

**Trý reyð kort vóru á lofti, tá H71 fór 10 minuttir ov tíðliga í summarfrí**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Einasti dysturin, sum kundi broyta nakað um støðuna, tá seinasta umfarið í landskappingini varð á skránni, var tann í Vestmanna.

Her kundi VÍF við einum sigri toga seg upp á fjórða plássið á stigatalvuni, og tað gekk eisini. Men tað var nú ikki meira enn akkurát. At kalla allan dystin hevði H71 munin, og tá farið varð um miðjan seinna hálvleik tóktist sigurin púrasta vísur.

Gestirnir høvdu fult tamarhald á tí allarmesta, og við 10 minuttum eftir á talvuni stóð 15-21.

Men so fóru hoyvíkingarnir annars í summarfrí. Tey sjey seinastu málini átti VÍF nevnliga, og tó at tað ikki stóð so øgiliga nógv upp á spæl, so merkti hetta at enda, at frustratiónirnar hjá H71 kókaðu yvir.

Tá avgerandi brotskastið varð dømt, kom ilt í fleiri av spælarunum. Endin varð, at dómararnir máttu senda triggjar mans í brús nøkur sekund undan liðfeløgunum. Men Agnar Joensen, sum hevur drigið sín part av lessinum fyri VÍF í vetur, legði tó líka í, og við síðsta málinum hetta kappingarárið lyfti hann VÍF upp á fjórða plássið.

## FAKTA

**VÍF-H71 22-21 (11-12)**
10 min: 2-2
20 min: 6-9
40 min: 13-17
50 min: 16-21
**Málskjúttar**
**VÍF:** Agnar Joensen 5(1), Rúni Joensen 5, Jákup S. Andreasen 4, Niels Andreasen 3, Sámal J. Djurhuus 2, Joen P. Høgnesen 1(1), John M. Andreasen 1, Regin Joensen 1
**H71:** Dánjal Tórgarð 5(2), Poul Kjartan Dam 4, Esbern Patursson 3, Niels Viggo Niclassen 2, Gunnar Bláberg 2, Johnny Durhuus 2, Rógvi Sørensen 2, Hans Kári Hansen 1
**Brotskøst:** VÍF 2, H71 2
**Útvísingar:** VÍF 4, H71 3
**Diskvalifikatiónir:** VÍF 1, H71 2 (allar beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr